**Samkoman Lívdin**

Kæru systkin í Harranum.

Nú enn eitt ár er farið, takka vit tykkum øllum fyri samfelag í verkinum í Zarepta. Takk fyri, at tit á ymiskan hátt hava tikið lut í verkinum. Bæði tit, ið komu vestur at hjálpa, og tit, ið stuðlaðu heimanífrá. Uttan tykkum hevði tað ikki verið møguligt at útint verkið.

Vanliga, tá ið legurnar byrja, er longu eitt stórt arbeiði gjørt. Umvælingar og umbyggingar eru framdar, og húsið er høvuðsreingjørt. Síðan er tað alt arbeiðið, ið gjørt verður, meðan legurnar eru – alt tað praktiska arbeiðið innan- og uttandura, og alt arbeiðið, ið hevur beinleiðis tilknýti til leguluttakararnar.

Alt hetta er samanlagt eitt andaligt verk og eitt sera stórt arbeiði, ið krevur nógvar hendur, og tað er okkum ein stór gleði at standa saman við tykkum í hesum verki. Latið okkum halda á at tæna Harranum, til Hann kemur.

Legurnar hava aftur í ár verið væl vitjaðar, og kendu vit eisini vernd og signing Harrans allan vegin. Uttan forbøn hevði arbeiðið skjótt dottið niður fyri. Vit vilja framvegis heita á tykkum at biðja fyri hesum arbeiði, at Harrin skal varðveita okkum í samfelag við Seg og geva vísdóm og náði at halda fram eftir vilja Hansara.

Ætlanin er at brúka januar mánað 2011 til umvælingararbeiði í Zarepta. Talan er um ymisk handverk, so sum timbur-, el-, rør-, múrara- og málaraarbeiði og annars vanligt viðlíkahald og at hampa um økið. Byrjað verður fríggjakvøldið 7. januar, og ætlanin er at brúka øll vikuskifti í januar umframt aðrar dagar, sum tað liggur fyri.

Hugaligt er at síggja tann offurvilja, sum vístur verður í hesum parti av verkinum í Zarepta, ið er so neyðugur, fyri at legurnar kunnu halda fram, og vóna vit, at eingin, sum hevur áhuga, heldur seg aftur. Um tú hevur áhuga í at vera við, ert tú vælkomin at kontakta ein av okkum, *Pola Vang, tlf. 214992*, *Heina Heinesen, tlf. 215213* ella *Jógvan Østerø, tlf. 597713*, ið saman við øðrum standa fyri hesum arbeiði.

Við vón og áliti á Harrans framhaldandi signing síggja vit fram til at halda fram við verkinum í Zarepta saman við tykkum.

*Bróðurliga,*
*John í Skemmuni, Jens Bech og John Færø*